Mikkjal Helmsdal:

# Áhugavert at fáa kapping

**–Tað kann gerast gott fyri okkum, um vit fáa ein kapping um dygd, sigur Mikkjal Helmsdal, sjónvarpsstjóri í viðmerking til ætlaðu nýggju føroysku sjónvarpsrásina**




*Mikkjal Helmsdal heldur, at møgulig kapping á føroyska sjónvarpsmarknaðinum verður ein avbjóðing fyri stovnin.*

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*

Sjónvarpsstjórin, Mikkjal Helmsdal, heldur, at hugskotið við einari sjónvarpsrás við føroyskum tilfari hjá Televarpinum ljóðar sera áhugaverdur.

—Eg haldi, at hatta sær sera áhugavert út, og eg bíði spentur eftir, hvat spyrst burturúr hasum ætlanunum, sigur Mikkjal Helmsdal.

Hann heldur ikki, at nýggja rásin við føroyskum tilfari setir Sjónvarp Føroya í nakra verri støðu.

—Tað kann gerast gott fyri okkum, um vit fáa ein kapping um dygd, sigur Mikkjal Helmsdal.

Frá royndum veit Mikkjal Helmsdal, at tað, at gera sjónvarpssendingar, krevur nógva orku – bæði nógv útgerð og nógv fólk.

Tískil kann tað gerast kostnaðarmikið at fara undir at framleiða umfatandi sjónvarpstilfar. Sjónvarpsstjórin sigur seg væl kunna ímynda sær, at áhugafeløg ella átrúnaðarligi bólkar eru áhugaðir í at senda frá eitt nú fundum og møtum, og hetta kanska kann gerast rímiliga bíliga.

### Umhugsa senditíð

At lata ella leiga senditíð til onnur er nakað, ið ikki er heilt frammant fyri Sjónvarp Føroya.

—Vit hava hugsa um at lata senditíð til onnur ella finna fram til, hvussu vit kunnu skipa fyri einum fólksligum varpi, har onnur eisini sleppa framat, sigur Mikkjal Helmsdal.

Enn er einki konkret sprottið burturúr hesum tonkunum, men sjónvarpsstjórin roknar við, at Sjónvarpið í komandi ári fer at taka fat um hendan spurningin.

Tað verður kortini ikki, hvat sum helst, sum sleppur á skíggjan hjá SvF.

—Í síðsta enda er tað eg sum sjónvarpsstjóri, sum hevur ábyrgdina av tí, sent verður, sigur Mikkjal Helmsdal.

### Talgilda

Í Sosialinum í gjár frættist tað eisini, at Televarpið segði seg vera sinnað at gjalda fyri eina digitalisering hjá SvF, soleiðis at sendast kann eitt talgilt signal beinleiðis úr Sjónvarpinum til Televarpið. Hetta skuldi betra um góðskuna.

Mikkjal Helmsdal sigur, at tað Sjónvarp Føroya hevur boðað Televarpinum frá, at teir als einki hava ímóti, at hetta stigið verður tikið, so leingi hetta ikki órógvar arbeiðið hjá teimum.

Mikkjal Helmsdal ger greitt, at tað verður Televarpið, sum skal gjalda allan kostnaðin av hesum.

Útgerðin er á veg til landi, sigur sjónvarpsstjórin.

Talan verður ikki um tað nógvu og stóru útgerðina. Tað mesta hjá Sjónvarpi Føroya verður tikið upp digitalt, so har er heldur eingin trupulleiki.

Málið er ikki endaliga avgreitt enn. Sjónvarp Føroya fær í komandi mánað nýggjan tekniskan leiðaran, og tað verður so hann, ið fer at taka endaliga støðu í málinum, og hvussu hetta skal gerast.

Nýggi tekniski leiðarin tekur við í januar. Nýggi tekniski leiðarin eitur Dávur Isfeld, og hann avloysir Jón Heðin Tróndheim.

# Frælsi selir

**Kappingin á GSM-marknaðin hevur givið hópin av kundum til Kall, sum hevur roynt seg við einari bevístari marknaðarføring til ungdómin**

GSM
*Heri á Rógvi*

Hjá Kall eru tey væl nøgd við gongdina hendan seinasta lítla mánaðin, tá Kall hevur bjóðað Føroya Tele av á GSM-økinum.

Stjórin fyri Kall, Bjarni Askham Bjarnason, vil ikki upplýsa nøkur tøl í løtuni yvir kundar, men hann sigur seg vera væl nøgdan, og teir hava merkt ein stóran áhuga.

Higartil hevur Kall roynt seg við sokallaðum talutíðarhaldum. Tað er talutíð, sum verður goldið áðrenn nýtsluna, heldur enn at ein rokning verður send.

Fyrst í komandi ári verður farið undir at bjóða "vanlig" hald, har rokning verður send mánaðarliga.

Higartil hevur Kall eisini kunna bjóða sínum kundum introduktiónsprísir. 1,75 kr. alt samdøgrið. Hesir prísir verða til 3,50 kr. um dagin og 1,75 kr. um kvøldið eftir 1. februar 2003.

Kappingin var næstan júst byrjað, tá Føroya Tele svaraði aftur við seta sínar talutíðarprísir nógv niður. Hetta gjørdi so, at Kall svaraði aftur við at lata sínum kundum 50 ókeypis SMS um mánaðin. Hetta tilboðið er galdandi fram til 1. apríl.

Eingir tekniskir trupulleikar hava heldur verið, sigur Bjarni Askham – bæði við teirra egna netið og samstarvinum við Føroya Tele.

Stjórin upplýsir, at tey flestu velja at skráseta seg, men tað er tó eingin treyt. Vinningurin fyri at skráseta seg er 50 kr. í talutíð.

### Eftir teimum ungu

Kall hevur lagt frá landi við at selja síni talutíðarkort í einari dós. Slagorðið hevur frælsi í dós, og higartil hevur frælsi verið góð søluvøra.

Bjarni Askham Bjarnason sigur, at teirra marknaðarføring er ógvuliga tilvitað.

—Vit eru farin út við fullari kraft. Vit valdu at analysera málbólkin hjá okkum, áðrenn vit fóru ígongd og hava so lagt marknaðarføringina eftir hesum, sigur Bjarni Askham Bjarnason.

Málbólkurin hjá Kalli er býttur í tveir bólkar: teirra verandi kundar og tey ungu. Tá sagt verður tey ungu, so verður hugsað um fólk upp til áleið tretivu ára aldur, upplýsir Kall stjórin.

—Vit hava so roynt at nýtt tey amboð, sum hóska seg til málbólki hjá okkum. Okkara verandi kundar fingu Sim-kort sendandi beinleiðis við postinum. Til tey ungu hava roynt lýsa og vera har, tey eru, sigur Bjarni Askham Bjarnason.

Hann nevnir, at teir eitt nú ikki hava sent nakra sjónvarpslýsing, tí teir meta ikki, at tað er, teir koma í samband við teirra málbólk. Hinvegin hava teir lagt seg eftir at hava ymisk tiltøk, sum fanga.




*Við boðskapinum um frælsi og frískari marknaðarføring hevur Kall tikið ein rímiligan part av GSM-marknaðinum í Føroyum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

## Starvsfólkamenning í norðurlondum

**Fleiri starvsfólk í landsumsitingini kunnu nú søkja um at sleppa í annað Norðurland at arbeiða. Føroyar hava í 2003 fingið 130.000 kr. at ráða yvir.**

*TÍÐINDASKRIV*

Skipanin Norðurlendskt tænastumannaumbýti gevur starvsfólki í landsfyrisitingini møguleika at arbeiða í einum norðurlandi í styttri tíðarskeið.

Í 2002 er fíggjarligt avlop í skipanini, og avgjørt er at býta yvirskotið millum Grønland, Ísland, Finnland og Føroyar.

Umsóknarfreistin er 06. januar 2003. Umsóknir, sum koma inn aftaná hesa dagfesting verða viðgjørdar, um peningur er tøkur.

Meira fæst at vita um skipanina á www.tinganes.fo undir Kunningartilfar og Førleikamenning, har upplýst eisini verður um bústaðarmøguleikar í Íslandi og Norra.



# Løgreglan stúrir fyri ruðuleika í Havn

**Løgreglan stúrir rættiliga fyri, hvussu tað fer at ganga at skipa ferðsluna í Havn, tá ið nýggja Norrøna og nýggja suðuroyarskipið koma. Hon vildi nógv heldur, at skipini fingu atløgupláss onkra aðrastaðni**



*–Eg skilji ikki, at býráðið ikki hevur funnið nýggju Norrønu og nýggja suðuroyarskipinum okkurt annað atløgupláss enn á Bursat anga, sigur Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur. Soleiðis sær út ein vanligan mikudag, tá ið Norrøna kemur.Tá ið nýggja Norrøna og nýggja suðuroyarskipið koma, stúrir hon fyri ferðsluni*

SAMFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*

Løgreglan í havn er ikki fegin fyri, at nýggja Norrøna og nýggi Smyril skulu leggja at í Havn.

Jón Klein Olsen, varapolitiinspektørur á løgreglustøðini í Havn, sigur, at løgreglan stúrir rættiliga fyri, hvussu tað fer at ganga at skipa ferðsluna, tá ið nýggja Norrøna og nýggja suðuroyarskipið koma.

Seinastu dagarnar hava nøkur sett spurning við arbeiðið at byggja Tórshavnar Havn út við tí endamáli at nýggja Norrøna og nýggja suðuroyarskipið skulu hava atløgupláss á Bursatanga.

Serliga stúra tey fyri, at tað fer at verða ruðuleiki í ferðsluni í Havn, tá ið bæði skipini koma og fara, fullfermd við bilum, tí tað er longu sum er, rættiliga hart trýst í vegirnar.

Millum tey, sum hava funnist at ætlanini, eru Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni. Hann hevur í Sosialinum víst á, at bæði Strandferðslan og Smyril Line hava heitt á Tórshavnar Býráð um at finna skipununum báðum annað atløgupláss. Og nú hevur eisini býráðslimurin fyri tjóðveldisflokkin, Hildur Eyðunsdóttir, mælt til at málið verður lagt fyri Býráðið, tí enn hevur tað ongantíð verið til viðgerðar og tað tekur floksfelagi hennara, Jógvan Arge, undir við.

### Stúra fyri ruðurleika

Men tað er Løgreglan, sum hevur eina stóra ábyrgd av, at ferðslan gongur, sum hon skal og vit hava spurt Jón, Klein Olsen, um løgreglan hevur gjørt sær tankar um hesi viðurskifti.

– Sjálvandi hava vit tað, tí vit eru rættiliga nógv við í royndunum at leggja ferðsluna so væl til rættis sum gjørligt, eftir at bæði skipini eru komin í sigling.

Men hann viðgongur samstundis, at løgreglan stúrir rættiliga fyri, hvussu tað fer at ganga at skipa ferðsluna, tá ið bæði skipini koma og fara.

– Løgreglan hevur ikki dult, at vit stúra fyri gongdini. Tað er ikki okkara borð at mæla býráðnum til, hvat tað skal gera ella ikki, men eg havi nevnt fyri teimum, at eg skilji ikki, at tey ikki hava funnið eina aðra loysn, tí vit vildu nógv heldur havt, at skipini fingu atløgupláss onkra aðra staðni.

Men samstundis ásannar løgreglumaðurin, at avgerðin er tikin um at bæði skipini skulu liggja í Tórshavnar Havn og tí telur løgreglan av fullum huga lut í arbeiðnum at skipa ferðsluna sum best.

– Vit vita, at tað er rættiliga nógv ferðsla í býnum, sum er og tí stúra vit fyri rættiliga stórum trupulleikum, tá ið bilar frá bæði Norrøna og nýggja Suðuroyarskipið eisini skulu avgreiðast.

Hann sigur, at grundarlagið undir nýggju Norrønu er eitt rættiliga stórt tal av bilum, samstundis sum eisini Smyril fer at flyta nógvar bilar.

–Tá íð bæði íleggjarar og fíggingarstovnar her heima og uttanlands, hava mett,at Norrøna fer at flyta eitt ávíst tal av bilum, ber illa til hjá okkum at undirmeta tað og tí eiga vit at leggja tey tølini til grund fyri teimum avgerðum, vit taka, heldur Jón Klein Olsen.

Hann sigur, at tilsamans skulu vit hava pláss fyri fleiri hundrað bilum afturat, tá ið bæði nýggja Norrøna og Smyril skulu avgreiðast.

– Men vit vita eisini, at tað eru bara 250 parkeringspláss niðri á havnalagnum og tí verður tað ein stór uppgáva at skipa fyri, hvussu bilarnir skulu koyra umborð og, hvar teir skulu bíða.

– Tað fer at krevja eitt sera umfatandi upplýsingararbeiði til ferðafólk, so at tey vita, hvar tey skulu bíða og, nær tey skulu koyra umborð.

### Mugu leggja upp fyri trupulleikum

Løgreglumaðurin hevur eisini eina hugsan um tær kanningar, sum eru gjørdar, eitt nú tær teldusimuleringar, sum eru gjørdar

– Modellroyndir og kanningar, sum eru gjørdar, kunnu verða góðar og tað skal helst eisini vísa seg, at tá ið alt gongur, sum tað skal, verða helst eingir trupulleikar av týdningi.

– Men vit eru noydd at leggja upp fyri teimum førunum, har alt ikki gongur eftir ætlan og tað ger tað rættiliga ofta, vita vit.

– Hvat hendir, tá ið ein treylari stendur fastur í einum svingi? Hvussu verður ferðslan, tá ið Norrøna verður seinkað ein ella tveir tímar, so at hon ikki kemur á Havnina kl 5 mánamorgun, men klokkan seks ella klokkan sjey?

– Tey, sum koyra bil í Havn upp undir arbeiðstíð um morgunin, vita, hvussu ferðslan er, so vit mugu viðganga, at vit stúra fyri, hvussu verður, tá ið vit harafturat skulu avgreiða hundraðtals bilar til ferjurnar uppá einar tveir tímar í trokingartíðini um morgnarnar ella seinnapartarnar.

Hann leggur afturat, at vit vita eisini, at taka trupulleikar seg upp, verður tað ikki bara niðri á Havnalagnum, at ferðslan verður tarnað.

– Vegirnir í Havn eru so trongir og bilarnir so nógvir, at tað verður beinanvegin, at allir býurin er typtur og tí fer tað at ávirka ferðslunna í øllum býnumm sigur Jón Klein Olsen. Og tí vildi Løgreglan nógv heldur havt, at skipini fingu atløgupláss onkra aðrastaðni.